*“ein lítil kvøða á tí stóra degnum”*

# EYSTUROYAR DANSIFELAG 40 ÁR

lag. Leirvíks Páll
leygarkvøldið 7. nov. 2009 í Leirvík

Sessast væl við veitsluborðið
haldum oss at gaman
fýrati eru árini
síðan tey komu saman.

*Fremjið nú ring á gólvi fram*
*á dansifrænda fund*
*títt so leikar tunga mín*
*í læettari lund.*

Eysturoyar Dansifelag
við megnar kvinnum og monnum
tóku sínum hondum saman
slógu ring av sonnum.

Tey bygdu land og nørdu um
hin fedra arvin forna
sum styrkir sál og mennir mál
fær mentahug at orna.

Tey ringin slógu, kvæði kvóðu
skjótt mann tíðin snara
Sama gamla siðaarvin
vilja vit væl vara.

Felags andi og felags mál
leikur og tungulist
skaldskapur og orðaspæl
og dansurin fremst og fyrst.

Okkara ríki kvæðasiður
hellubotnur tryggur
støði undir skriftmáli
og listarfólkum dyggur.

Lat okkum hevja drykkjuhorn
so má ynski ljóða
Eysturoyar Dansifelag
hav langa framtíð og góða.

regin d